**Bóltfelagið B36**
**Stovnað: 28.03.1936**
**FO-110 Tórshavn, Postrúm 1136**
**Tlf. 311936/Fax 318036**
**Formaður:** Kristian á Neystabø

**Meistarar (7):** 1946, 1948, 1950, 1959, 1962, 1997, 2001
**Steypavinnarar (3):** 1965, 1991, 2001
**Greipuvinnarar (1):** 2001
**Í 1. Deild (57 ár):** 1942-1943, 1945-1984, 1986, 1988-
**Í Europa (6):** Meistarakapping 1998/99, 2002/2003, Steypavinnarar 1992/93, UEFA Cup 1999/00, 2000/01, Intertoto 1997/98

# Stjørnuliðið skal finna rútmuna

**B36 hevur styrkt sær liðið við fleiri spælarum, sum hava drúgvar royndir frá altjóða dystum, og uppgávan verður at samansjóðað liðið**

EYÐUN KLAKSTEIN



*Á pappírinum sær tað gott út hjá B36, men stóra uppgávan er at fáa mongu stjørnuspælararnar at virka sum eitt lið.*

Mynd: Álvur Haraldsen

B36 hevur rættiliga styrkt sær um liðið í ár, og hóast onkrir góðir spælarar eru farnir til onnur feløg, hava teir lokkað spælarar við drúgvum royndum til felagið.

Á pappírinum sær tað gott út, men stóra uppgávan er at fáa mongu stjørnuspælararnar at virka sum eitt lið á vøllinum.

Heðin á Lakjuni og Allan Mørkøre eru komnir úr KÍ, og teir skulu væntandi spæla sentralar leiklutir á B36-liðnum. Tað sama verður roknað við Pól Thorsteinsson, sum tók eitt ár í Runavík í fjør.

Tveir av stuðulsspælarunum frá í fjør eru farnir til EB/Streym at spæla. Magni á Lakjuni, sum spældi við í øllum landskappingardystunum í fjør og skoraði fimm mál, er annar teirra, og verjuálitið, Egil á Bø, sum somuleiðis spældi allar dystirnar í fjør, er hin.

Men samanumtikið er B36 neyvan verri fyri í ár, enn teir vóru í fjør, tá ið tað ræður um spælarar.

### Stuðulsspælarar og skaðar

Kappingarárið í fjør royndist illa hjá B36, og nú verður tað uppgávan hjá Ion Geolgau at føra felagið fram til ein sigur í ár. Tað er einki at fjala út yvir, at B36 stílar eftir gullinum, og tað heldur venjarin er realistiskt.

– Nógv gera okkum til favorittar, og eg skilji tey. Tá ið vit hava allar okkara spælarar tøkar, hava vit eitt sera gott lið, sum kann vinna meistaraheitið, sigur Ion.

Hann stúrir eitt sindur fyri, at stuðulsspælarar skulu fáa skaðar, tí hann helt seg síggja, hvussu tað spældi av fyrstu tveir steypadystirnar í ár.

– Tá ið tú manglar fleiri av tínum bestu spælarunum, so gerst tað trupult at vinna á góðum feløgum sum HB og GÍ, men eg haldi, at teir teir dystirnir vístu, at vit hava nakrar ungar spælarar, sum felagið kann vænta sær nógv av í framtíðini.

Men teir royndu spælararnir í felagnum skulu ganga undan, og menn sum John Petersen, Jákup á Borg, Jens Kristian Hansen, Allan Mørkøre, Pól Thorsteinsson og Heðin á Lakjuni verða millum lyklaspælararnar, sum skulu gera B36 til meistarar í ár.

## Leikarahópur

Tølini, sum eru viðmerkt, siga, hvussu nógvar dystir/mál leikarin spældi/gjørdi fyri felagið í 2002, og hvussu nógv (gul-reyð) kort leikarin hevur fingið í sama tíðarskeiði.

| Navn | Í fjør | Landsdystir | Áður spælt við |
|---|---|---|---|
| **Málverjar** | | | |
| Tróndur Vatnhamar | 6/-8 (0-0) | | |
| René Tórgarð | 12/-15 (0-0) | | |
| Magnus Poulsen | 1/-1 (0-0) | | B68 |
| **Verja** | | | |
| Jens Kristian Hansen | 14/2 (0-0) | 44/3 | |
| Nicolae Zafir (RUM) | | | |
| Arnbjørn Danielsen | 17/0 (2-1) | 7/0 | B68 |
| Fróði Clementsen | 11/1 (3-0) | | B68 |
| Pól Thorsteinsson | | 25/0 | VB, NSÍ |
| Jón Brekku | 5/0 (0-0) | | B71 |
| Herbert í Lon Jacobsen | 2/0 (0-0) | | |
| Áki Mørk | 2/0 (0-0) | | |
| **Miðvøllur** | | | |
| Kenneth Jacobsen | 17/3 (3-0) | | |
| Julian S. Johnsson | 8/3 (0-1) | 47/2 | HB |
| Jákup á Borg | 14/6 (3-1) | 24/0 | |
| Niels Joensen | 10/0 (0-0) | | |
| Bergur Midjord | | | |
| Klæmint Matras | 13/0 (1-0) | 1/0 | |
| Heini í Skorini | 10/2 (0-0) | | |
| Allan Mørkøre | | 54/1 | KÍ, HB |

| Navn | Í fjør | Landsdystir | Áður spælt við |
|---|---|---|---|
| **Álop** | | | |
| John Petersen | 17/15 (1-1) | 43/5 | B68, GÍ |
| Tórálvur Poulsen | 7/2 (0-0) | | |
| Heðin á Lakjuni | | 9/0 | KÍ |
| Bárður Mortansson | 16/7 (4-0) | | HB |
| Carl H. Høgnesen | | | |
| **Tilgongd** | | | |
| Nicolae Zafir (RUM) | | Rumenia | |
| Allan Mørkøre | 17/2 (0-0) | KÍ | |
| Heðin á Lakjuni | 11/8 (1-0) | KÍ | |
| Pól Thorsteinsson | 15/2 (2-0) | NSÍ | |
| **Frágongd** | | | |
| Egil á Bø | 18/5 (1-0) | EB/Streymur | |
| Magni á Lakjuni | 18/5 (2-0) | EB/Streymur | |
| Iulian Florescu (RUM) | 13/1 (1-1) | Skála | |
| Din Sandu (RUM) | 4/0 (0-0) | Rumenia | |
| Hertbert í Lon Jacobsen | 2/0 (0-0) | ÍF Føroyar | |
| Karl Leonson | 2/0 (0-0) | AB | |
| **Venjari** | | | |
| Ion Geolgau (RUM) | | | |





*– Eg vil vinna, og eg vil arbeiða við góðum spælarum. Hetta letur seg gera í B36, og eg var sera stoltur, tá ið teir ringdu til mín fyrstu ferð. Tað vísti, at hóast HB og B36 eru harðir kappingarneytar, so var tað einki persónligt millum meg og B36, sigur Ion Geolgau, venjari hjá B36.*

Mynd: Álvur Haraldsen

# Heilin fram um hjartað

**– Tú mást sum venjari taka nógvar stórar avgerðir eftir stuttari tíð, og tú mást taka tær sjálvur. Tú kanst ikki lurta eftir áskoðarum ella spælarum, og tú mást sum venjari hugsa við heilanum og ikki hjartanum, sigur Ion Geolgau, sum er farin frá HB til B36 at vera venjari**

EYÐUN KLAKSTEIN

Tað eru seks sekund eftir til avtalaðu tíðina.

Hurðin gongur í B36-húsinum, og inn kemur ein myrkløddur maður í venjingarbúna.

Hann er Ion Geolgau, og hann kemur til tíðina.

Rumenski venjarin krevur nógv av sínum monnum, og hann vil hava disiplin á liðnum. Tað vísir hann eisini við at ganga undan sjálvur.

– Sum venjari vil eg fegin arbeiða við góðum spælarum, og eg leggi dent á at hava disiplinina í lagi. Og eg kann bara fegnast um, at tað gongur væl við hesum í B36, sigur Ion.

Nýggi B36-venjarin hevur verið í Føroyum síðani 1998, og fram til seinnu hálvu av landskappingini í fjør var hann venjari í HB. Har vann hann eitt meistaraheitið og legði grundalagið undir sigrinum í fjør.

– Tað var trupult fyri báðar partar, tá ið eg varð sagdur úr starvi. Eg var vónbrotin, men tað kom ikki óvart á meg. Nú er HB fullkomiliga søga fyri meg, eg havi einki at gera har longur. Men mær dámar ikki at tosa um tað, tí eg líti fram á og hugsi um mína uppgávu í B36, sigur hann.

### Fekk samband við HB

Ion Geolgau fekk fyrsta sambandið við føroyskan fótbólt, tá ið HB spældi ímóti Universitatea Craiova, har hann bæði hevur spælt og hevur verið venjari.

Í 1997 var hann ringdur upp av HB, sum leitaði eftir venjara, og teir spurdu hann, um hann kendi onkran, sum kundi hóska til hesa uppgávu. Tá var Ion vorðin hjálparvenjari í Craiova, og hann hugsaði ikki um at skifta starv.

Men seinni í hesum árinum kom okkurt upp í felagnum, og hann hevði ikki hug at halda fram í Craiova. Tá fekk hann hug at fara til Føroya at royna seg sum venjara.

Og her hevur hann so verið seinastu stívliga fimm árini.

– Ein munur millum at vera venjari her og í Rumenia er, at í Rumenia eru allir spælararnir yrkisspælarar, og teir venjar einar sjey ella átta ferðir um vikuna. Her venja spælararnir fýra ella fimm ferðir.

– Men veðrið í Rumenia er nógv verri í januar og februar, enn tað er her, so tað hevur ikki nervað meg, sigur Ion.

### Lætt at skifta felag

Tá ið Ion fór úr starvinum í HB, lógu fleiri feløg fram við eftir at fáa hann til venjara.

– Eg vil vinna, og eg vil arbeiða við góðum spælarum. Hetta letur seg gera í B36, og eg var sera stoltur, tá ið teir ringdu til mín fyrstu ferð. Tað vísti, at hóast HB og B36 eru harðir kappingarneytar, so var tað einki persónligt millum meg og B36, sigur hann.

– Umstøðurnar í HB og B36 eru líkar, og tað hevur ikki verið nakar trupulleiki fyri meg at skifta. Eg eri væl móttikin í B36, og felagið er væl skipað. Tá eg kom til HB, kendi eg púrt einki til føroyskan fótbólt, men nú havi eg verið her í fleiri ár, og tí er tað øðrvísi at byrja í B36, tí eg kendi allar spælararnar frammanundan.

### Stórar avgerðir skulu takast

Venjarastarvið er krevjandi, og tað kann eisini vera einsligt.

– Tað er lætt at leggja skránna fyri venjingina og at fyrireika seg til dystirnar, men tað skulu nógvar stórar avgerðir takast upp á stutta tíð undir dystunum, og tá ert tú púra einsamallur, tí tú hevur ábyrgdina og skalt taka avgerðina sjálvur. Tað nyttar einki at lurta eftir spælarum ella áskoðarum.

– Tú mást hugsa við heilanum og ikki við hjartanum, sigur hann.

Eitt er fyrireikingin áðrenn dystirnar, men tað tekur eisini tíð at fáa lagt ein dyst afturum.

– Eg hugsi nógv um dystirnar aftaná, og tað tekur nógvar tímar, áðrenn eg sleppi leysur av dystinum. Eg hugsi um, hvat var gott, og hvat var minni gott, men tað nyttar einki at hugsa ov nógv um eitt tap, tí tapini eru ein partur av fótbóltinum.

Ion heldur eisini, at tað er umráðandi at duga at vinna.

– Í Rumenia siga vit, at tú mást ikki fegnast um ein sigur í meira enn tríggjar dagar.

### Trívast væl

Ion Geolgau og konan búgva í Føroyum, men dóttir teirra er í Rumenia, har hon gongur í skúla.

– Tað er hart til tíðir, men dóttirin plagar at koma til Føroya um summarið, og vit eru í Rumenia um veturin, so tað gongur nøkulunda, sigur Ion.

– Vit kundu hugsa okkum at verið í Føroyum í trý ár afturat, til dóttirin hjá okkum er liðug við skúlan. Tá skulu vit so finna út av, um vit vilja vera í Føroyum, ella um vit skulu vera í Rumenia.

– Vit hava verið í meira enn fimm ár í Føroyum, og vit hava tað sera gott her, sigur Ion Geolgau.

Hetta árið verður tað sum venjari í B36, at hann skal royna at leggja okkurt afturat gyltu heiðursmerkjunum hjá sær.